# Nógv minni av nebbasild

Kanningar, sum Danmarks Fiskeriundersøgelser gjørdi í desember, vísa, at nógv minni av nebbasildayngli er til í ár enn somu tíð í fjør

Danir kunnu ikki vænta sær góðan fiskiskap eftir nebbasild í nærmastu framtíð, um kanningarnar, sum Danmarks Fiskeriundersøgelser gjørdi í desember, eru álítandi.

Kanningarnar vísa nevniliga, at títtleikin av nebbasild í kannaðu økjunum var 50% minni í desember í ár enn sama mánaða árið fyri.

Bæði fiskur og fuglur eta nebbasild, so óhugsandi er ikki, at hetta upp á sikt kann koma at merkjast - í havinum og oman á havinum. **(-vilmund)**



*Kanningarnar av nebbasild, sum danir hava gjørt, vísa, at lítið er til av yngli*

# Søgan í stuttum aftanfyri O.

**– Navnið O. C. Joensen hevur sín uppruna hjá abba mínum, Ole Christian Joensen, sum var bóndasonur av Oyri, og sum sjálvur eisini var bóndi. Men tað virksemi, sum hann byrjaði fyri eini 100 árum síðani, kann á ongan hátt samanberast við tað virksemi, sum upp ígjøgnum tíðirnar spurdist burtur úr. Men navnið hevur hingið eftir – og gjørdi tað framvegis, nú meirilutin í O. C. Holding varð seldur, sigur Edmund Joensen, sum í stuttum greiðir frá tí virksemi, sum hevur verið á Oyri upp ígjøgnum árini**



AFTURHVARV

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú P/F Thor í Hósvík hevur keypt 60% av felagnum O. C. Holding á Oyri, kundi verið áhugavert í stuttum at hugt at søguni aftanfyri gamla felagið á Oyri.

Meðan Thor byrjaði sítt virksemi í smáum tíðliga í nítiárunum, og í dag hevur eini 400-500 fólk í starvi, hevur gamla navnið O.C. Joensen røtur langt afturi í tíðini.

Tað eru kanska eini 100 ár síðan, at abbin til tey fimm systkini, sum seinastu mongu árini hava staðið aftanfyri virksemið í Oyri, fór undir virksemi, sum seinni í tíðini vaks seg rættiliga stórt.

### Bóndasonur slóðaði

Sosialurin hevur spurt Edmund Joensen, sum í nógv ár var stjóri og nevndarformaður í felagnum, um søguna aftanfyri virksemið.

Vit hittu hann í telefonini í gjár, tá ið hann var í Danmark. Hetta er tískil ikki nøkur neyv lýsing, men bert eitt ”strok” um tað virksemi, ið seinni gjørdist til tað, sum mong seinnu kendu tað.

– Navnið O. C. Joensen hevur sín uppruna hjá abba mínum, Ole Christian Joensen, sum var bóndasonur av Oyri, og sum sjálvur eisini var bóndi. Men tað virksemi, sum hann byrjaði fyri eini 100 árum síðan, kann á ongan hátt samanberast við tað virksemi, sum upp ígjøgnum tíðirnar spurdist burtur úr. Men navnið hevur hingið eftir – og gjørdi tað framvegis, nú meirilutin av O. C. Holding varð seldur á aðrar hendur.

Edmund sigur, at abbi hansara hevði handilsloyvi og lítlan handil í bygdini – ein sonevndan ”klovahandil”, ið fyrst og fremst seldi neyðsynjarvørur.

### Sildavirksemi

Synir Ole Christian Joensen, Poul og Jógvan Joensen, førdu síðan navnið víðari sum firma O. C. Joensen. Teir høvdu handil við fjølbroyttum úrvali, har teir seldu alt millum himmal og jørð - heilt frá matvørum til eitt nú timbur og olju.

Teir høvdu líkasum heilsøluvirksemi.

– Tá ið eg var ungur, keyptu teir fjarðasild, bæði frá bátum í Sundalagnum og av Skálafjørðinum, tá ið sild stóð á firðum og sundum. Hetta var ein lutfalsliga stór vinna eftir tátíðar mátistokki.

Í fimtiárunum fóru teir so eisini at keypa havsild, og í hesum sambandi leigaðu teir gjøgnum árini fleiri ymisk skip til garnaveiði.

– Sildin varð løgd upp á Oyri, og um veturin varð hon tikin uppaftur úr tunnunum, skild í støddir og eftir góðsku, vigað og síðan pakkað av nýggjum til útflutnings.

Edmund sigur, at umframt at leiga skip til sildaveiði í vertíðini, keypti felagið eisini skip, eitt nú Agnas Louise, ið einaferð gjørdist partur av valorrustu.

– Í vertíðini var hetta ein rættiliga stór vinna eftir tátíðar mátistokki – og eisini, tá ið sildin skuldi pakkast av nýggjum og avskipast.

Eini tvey ár, áðrenn norðhavssildin helt uppat í 1967, keypti felagið eisini Poppy.

Tá ið eingin sild var at fáa meira, fór Poppy at føra sand, sum báturin tók upp við grabba, og Edmund minnist onkra buldrasliga ferð heilt suður til Suðuroyar við sandi.

### Skeljaveiðan

Móti endanum av sekstiárunum fóru oyrarmenn at fyrireika seg til skeljaveiði, sum skuldi gerast ein týðandi partur av virksemi felagsins – og er tað enn í dag heili 36-37 ár seinni.

Edmund sigur, at teir fóru niður til Hetlands at kunna seg um hesa veiði og framleiðslu, og Poppy varð riggaður til har niðri við dreggum og øllum, sum hoyrir til hesa veiði.

– Vit fingu stóra hjálp frá Sofusi Poulsen, sum longu tá var okkara umboðsmaður í Aberdeen. Hann var ein góður maður at hava har niðri. Sofus hjálpti okkum at fáa fatur á reiðskapi í Skotlandi, og tá ið skipið kom heimaftur til Føroya, var klárt at loysa og fara á royndarveiði.

Í Hetlandi veiddu og virkaðu teir mest eina størri skel enn okkara jákupsskel, men teirra virksemi var øgvuliga primitivt, eins og tað í byrjanini eisini var í Føroyum.

Aftrat sær til hjálpar at fáa eina skeljavinnu á føtur í Føroyum, hevði O. C. Joensen eisini ein dana, Benny Jensen, sum hevði skil fyri dygd. Hesin var eisini við í USA fyri at kunna seg um dygd-og marknaðarviðurskifti.

Edmund heldur seg minnast, at Poppy var klár at fara á skeljaveiði 1. desember í 1970.

– Eg hevði eingi pappírir, men var virkandi skipari umborð á Poppy á



*Móti endanum av sekstiárunum fóru oyrarmenn at fyrireika seg til skeljaveiði, sum skuldi gerast ein týðandi partur av virksemi felagsins – og er tað enn í dag heili 36-37 ár seinni. Hekkutrolarin Norðheim hevur í mong ár tryggjað virkinum rávøru, umleið 4.000 tons um árið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*